FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

**Argir**, 22. desember 2015

**J.Nr.:** 15/00612-8
**Tygara skriv:** 13/2015

## Fyrispurningur um útgjald úr Samhaldsfasta, settur Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

## Kári P. Højgaard, løgtingsmaður

1. Hvussu nógvir persónar, sum búgva uttanlands, fáa útgoldið úr Samhaldsfasta?
2. Hvussu verður ávirkanin á inngjald/útgjald úr Samhaldsfasta, tá grunnurin, sum skuldi verða ískoyti til pensjónina, nú verður tann berandi grundstuðulin?
3. Fara allir pensjónistar, sum í dag fáa útgjald úr Samhaldsfasta, at fáa sama ágóða av hækkingini?
4. Hvørji stig fer landsstýriskvinnan at taka, til tess at greiða mismunin millum pensjón og Samhaldsfasta, tá føroyingar, sum hava arbeitt í Grønlandi ella Danmark, venda heimaftur at búgva og eru fyri vanbýti?
5. Er tað almennu Føroyar, sum eiga Samhaldsfasta og hava ræðisrættin, ella eru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum?
6. Um arbeiðsmarknaðurin eigur Samhaldsfasta, og politiska skipanin áleggur stýrinum, hvat skal útgjaldast, og fráboðar, at hereftir skal pensjónin í størri mun liggja uttanfyri landskassan og gjaldast av arbeiðsmarknaðinum, er talan tá ikki um ognartøku av grunninum?
7. Er nakar møguleiki fyri, at samgongan tekur uppskotið um lækking av grundupphæddini í fólkapensjónini aftur og bíðar, til fráboðaða breiða semjan er veruleiki á ólavsøku 2016?

## Svar

### Til nr. 1

Umleið 600 persónar, sum búgva uttanlands, fáa útgoldið úr Samhaldsfasta.

### Til nr. 2

Samhaldsfasti avger, hvat lutfallið er millum inngjald og útgjald. Hetta verður leypandi tillagað, fyri at tryggja haldførið í skipanini yvir tíð. Tað, at Samhaldsfasti gerst ein størri partur av framtíðar pensjónsskipanini fer í sjálvum sær væntandi ikki at broyta lutfallið millum inngjald og útgjald. Men um so verður, at lóggávan verður broytt í sambandi við pensjónsnýskipanararbeiðið í 2016, kann hetta fáa ávirkan á lutfallið millum inngjald og útgjald.

### Til nr. 3

Nýggjastu tøl hesum viðvíkjandi eru frá november 2015. Tá fingu 7.886 fólk útgjald úr Samhaldsfasta samanlagt. Av hesum vóru 266 fólk við bústaði í Føroyum, ið fingu brotpensjón vegna tað, at tey frá ár millum 15 og 67 ár hava havt fastan bústað í Føroyum. Tey, ið fáa brotpensjón úr Samhaldsfasta fáa ikki fullan ágóða av hækkaða útgjaldinum úr Samhaldsfasta. Í

broytingaruppskoti til løgtingsmál 29/2015 varð tryggjað, at ongin verandi fólkapensjónistur fær minni útgoldið í fólkapensjón og samhaldsfasta orsakað av, at hesin ikki hevur rætt til fult útgjald úr samhaldsfasta

**Til nr. 4**

Ætlanin er at endurskoða regluverkið kring Samhaldsfasta, harundir reglurnar um hvør hevur rætt til útgjald úr grunninum í sambandi við pensjónsnýskipanararbeiðið í 2016.

**Til nr. 5**

Landið hevur ræðisrættin yvir AMEG, sum er skipaður sum grunnur uttanfyri fíggjarlógina. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru umboðaðir í stýrinum fyri grunnin. Støða grunsins er lýst í frágreiðing hjá Landsgrannskoðanini frá 2014 um leiklutin hjá landinum í partafeløgum, grunnum og øðrum virkiseindum, bls. 150-152 og í álitinum um landsstovnar og –grunnar frá november 2001 (Grunnaálitið), bls. 68-71.

**Til nr. 6**

Stýrið ásetur árligu veitingina úr grunninum samsvarandi lógini um samhaldsfasta (lóg nr. 39 frá 7. Mai 1991). Sí annars svar til nr. 5 omanfyri. Upplýsast kann harafturat, at Samhaldsfasti eigur at verða kjølfestur í eini komandi Stjórnarskipan Føroya, soleiðis at rætturin hjá øllum føroyingum til eina trygga pensjón nú og framyvir úr Samhaldsfasta í enn størri mun verður tryggjaður.

**Til nr. 7**

Samgongan hevur sett sær fyri at geva pensjónistum betri fíggjarligt rásarúm longu frá 1. januar 2016. Hetta krevur, at átøk verða framd beinanvegin.

Samanlagt fara broytingarnar í fólkapensjón, Heilsutrygd, Samhaldsfasta og kringvarpsgjaldi at tryggja, at ein stakur pensjónistur, sum bert hevur fólkapensjón og Samhaldsfasta at liva av, fær um 4.600 kr. meira at liva av í 2016, og at eini pensjónistahjún í somu støðu samanlagt fáa um 4.700 kr. meira at liva av í 2016 sammett við 2015.

Vegna skattalættan til lág- og miðallønt vilja pensjónistar við inntøku afturat pensjónini fáa enn størri fíggjarligt rásarúm. Ein stakur pensjónistur við 10.000 kr. í inntøku mánaðarliga afturat pensjónini, fær um 8.800 kr. meira at liva av í 2016 enn 2015, og er inntøkan 20.000 kr. mánaðarliga, fær pensjónisturin um 10.600 kr. meira at liva av í 2016 sammett við 2015.

Talan er sostatt um átøk, ið geva pensjónistum munandi fíggjarligan lætta í 2016, og landsstýrið og samgongan meta, at hetta eru átøk, ið eiga at verða framd í verki.

Samstundis verður ferð sett á arbeiðið við endaligu pensjónsnýskipanini í 2016. Politisku flokkarnir hava fingið fráboðan um at velja umboð í politiska fylgibólkin, og eftir ætlan skal uppskot til nýggja pensjónsskipan vera klárt á Ólavsøku 2016. Pensjónsnýskipanin skal gerast í tøttum samstarvi við allar avvarðandi partar, eitt nú partarnar á arbeiðsmarknaðinum og Landsfelag Pensjónista. Eisini verður miðað eftir at fáa eina so breiða politiska semju sum gjørligt fyri at tryggja eina varandi og góða framtíðar pensjónsskipan í Føroyum.

**Kristina Háfoss**

*landsstýriskvinna*